## FCK vann í Prag

Donsku meistararnir úr FCK vunnu í gjár imponerandi tryggan sigur á útivølli móti kekkiska Sparta Prag. Stóra spælarin í dystinum var Dame N'Doye, sum skeyt tey fyrstu málini, umframt at hann eisini var maðurin, sum vann brotssparkið, sum Jesper Grønkjær umsetti til 3-0. Við hesum er FCK við í knockout-partinum, tá farið verður endaliga part av European League til várs.



## Woods er tann størsti

Hóast ágangurin hevur verið harður seinastu vikurnar, er Tiger Woods júst kosin sum størsta ítróttarnavnið yvirhøvur seinasta tíggjuára-skeiðið. Tað er úrslitið av eini atkvøðugreiðslu, sum AP hevur staðið fyri. Tiger Woods fekk 56 av 142 atkvøðum, og var við hesum langt fremstur. Nummar tvey gjørdist Lance Armstrong við 33 atkvøðum, og honum á baki komu Roger Federer, Michael Pjelps, Tom Brady og Usain Bolt.

# Christian og Johan Símun við Newcastle

**Liðskiparin og stórskjúttin hjá føroyska U21-landsliðnum, spældu í gjár við eykaliðnum hjá Newcastle**



Jákup Mørk

Teir báðir hava í ár verið millum profilarnar á føroyska U21-landsliðnum, sum hevur fingið framúr úrslit. Millum annað við 1-0 sigrinum á Russlandi, har Colin Calderwood, sum er fyrstaliðsvenjari hjá Newcastle, var millum áskoðararnar.

Og nú eru teir í Newcastle til royndarvenjingar, og á heimasíðuni hjá felagnum verður skrivað, at teir báðir spældu við í dystinum hjá eykaliðnum móti skotska Hibernian.

Dysturin endaði 2-2, eftir at Newcastle annars hevði verið á odda 2-0. Millum liðfelagarnir hjá teimum báðum vóru menn sum Geremi Nijtap og Shola Amoebi, sum báðir hava spælt nógvar dystir í ensku Premier League.

Johan Símun Edmundsson spældi allan dystin á miðvøllinum fyri Newcastle, meðan Christian Restorff Mouritsen varð skiftur út eftir góðum tíma.

Teir báðir spælararnir koma aftur til Føroya í dag.



Johan Símun Edmundsson hevur saman við Christiani Restorff Mouritsen verið til royndarvenjingar í Newcastle

# Benitez bjargaði sær

**Liverpool vann neyðugu stigini heima móti Wigan, og á Stamford Bridge mundi Chelsea hálvsnávað móti Portsmouth**

Trýstið á Rafael Benitez, venjara hjá Liverpool, hevur veri døgiligt seinastu nógvu vikurnar, men í gjár fekk spaniólin eitt sindur at smílast um.



Jákup Mørk

Tað stóð tó hampuliga nógv á Liverpool. Tíðliga í dystinum móti Wigan skoraði Ngog til 1-0, men tað var ikki fyrr enn í 79. minutti, at Torres økti til 2-0 og harvið tók spenningin úr dystinum.

Á Stamford Bridge stóð eisini nógv á heimaliðnum. Chelsea tóktist annars stýra tí mesta, eftir at teir høvdu lagt seg á odda. Men tá teir tíðliga í seinna hálvleiki fyri 12. ferð í ár lótu mótstøðuliðið skorað eftir deyðbólt, gjørdist spenningurin øgiligur.

Chelsea tóktist stevna móti fimta dystinum á rað uttan sigur, men við einum brotssparksmáli frá Lampard fekk oddaliðið kortini sigurin, sum aftur skeyt teir trý stig framum Manchester United í oddastríðnum.

Heilt so væl gekst ikki hjá Arsenal, sum við javnleiki móti Burnley misti týðandi fet. Og á White Hart Lane fingu milliardaíløgurnar hjá Manchester City av at vita móti einum heimaliði, sum hevði sítt at prógva eftir blamasjuna móti Wolves um vikuskiftið.

## FAKTA

**Úrslitini mikukvøldið**

| | |
|---|---|
| Burnley-Arsenal | 1-1 |
| Chelsea-Portsmouth | 2-1 |
| Liverpool-Wigan | 2-1 |
| Tottenham-Man.City | 3-0 |




Sjálvsfatanin hjá siðvanda Liverpool hevur fingið nøkur álvarslig skot fyri bógvin í heyst. Í gjár eydnaðist tó at toga ein sigur heim móti Wigan
Mynd: Polfoto/AP

### Premier League

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Chelsea | 17 | 13 | - | 1 | - | 3 | 42 | 14 | 28 | 40 |
| 2 | Man Utd. | 17 | 12 | - | 1 | - | 4 | 37 | 14 | 23 | 37 |
| 3 | Arsenal | 16 | 10 | - | 2 | - | 4 | 41 | 20 | 21 | 32 |
| 4 | Aston Villa | 17 | 9 | - | 5 | - | 3 | 28 | 14 | 14 | 32 |
| 5 | Tottenham | 17 | 9 | - | 3 | - | 5 | 38 | 22 | 16 | 30 |
| 6 | Liverpool | 17 | 8 | - | 3 | - | 6 | 34 | 23 | 11 | 27 |
| 7 | Birmingham | 17 | 8 | - | 3 | - | 6 | 18 | 17 | 1 | 27 |
| 8 | Man City | 16 | 6 | - | 8 | - | 2 | 29 | 24 | 5 | 26 |
| 9 | Fulham | 16 | 6 | - | 5 | - | 5 | 20 | 17 | 3 | 23 |
| 10 | Sunderland | 17 | 6 | - | 3 | - | 8 | 22 | 24 | -2 | 21 |
| 11 | Stoke | 16 | 5 | - | 6 | - | 5 | 15 | 19 | -4 | 21 |
| 12 | Blackburn | 17 | 5 | - | 4 | - | 8 | 17 | 30 | -13 | 19 |
| 13 | Burnley | 17 | 5 | - | 4 | - | 8 | 21 | 35 | -14 | 19 |
| 14 | Wigan | 17 | 5 | - | 3 | - | 9 | 20 | 38 | -18 | 18 |
| 15 | Everton | 16 | 4 | - | 5 | - | 7 | 22 | 30 | -8 | 17 |
| 16 | Hull | 17 | 4 | - | 5 | - | 8 | 17 | 34 | -17 | 17 |
| 17 | Bolton | 16 | 4 | - | 4 | - | 8 | 23 | 33 | -10 | 16 |
| 18 | Wolves | 17 | 4 | - | 4 | - | 9 | 15 | 31 | -16 | 16 |
| 19 | West Ham | 17 | 3 | - | 5 | - | 9 | 25 | 34 | -9 | 14 |
| 20 | Portsmouth | 17 | 3 | - | 2 | - | 12 | 15 | 26 | -11 | 11 |